# VEL FRAMSÓKN Í BÝRÁÐIÐ

FRAMSÓKN LIBERALI TJÓÐSKAPARFLOKKURIN

## GÓÐ HUGSKOT RUSTA IKKI

Inni á Gøtu, stendur ein virðislønt, perlu rond av húsum, ið kommunan beyð til sølu, byggibúgvin, við brandmúrum.
Vit skulu venda aftur til tey góðu hugskotini og ikki bara gera sum vit plaga. Tað má og skal verða léttari at fáa sítt egna og vit eiga at gagnnýta byggilendi betri.

## NÝGGJAR RABARBUR

Góða, gamla Rabarbukvarterið, millum Varðagøtu og Heygsbreyt, er gott dømi um byggimynstur, har smærri grundøki og har byggjast kann í mark, hava eydnast til fulnar. Meira av hasum og fleiri rabarbur.

## LÆKKA KOMMUNUSKATTIN OG HÆKKA BARNAFRÁDRÁTTIN

Ungar barnafamiljur eru undir trýsti av nógvum, føstum útreiðslum. Lækka vit kommunuskattin, merkja húskini hetta beinanvegin. Eitt annað, sum hevði hjálpt barna familjum, er hægri barnafrádráttur. Hækka vit frádráttin, kann ein familja sjálv gera av, hvussu økta, tøka upp hæddin skal brúkast, heldur enn at kommunan tilskilar, hvat peningurin skal brúkast til.

## TAÐ SKAL VERÐA NÓGV LÆTTARI AT VERA FORELDUR

Vit skulu kanna, um ikki dagstovnar og fólkaskúlin kunnu veita børnum og ungum dygdargóðan mat, meðan tey eru á stovni og í skúla. Tað hevði lætt um hjá nógvum, at sloppið undan mat pakkum, tí tíðin er nóg knøpp sum er.

## FLEIRI ANSINGARPLÁSS BEINANVEGIN

Fyri at skunda undir og taka broddin av bráðneyðuga tørvinum á stovnsplássum, skulu verandi dagstovnar, har tað ber til, byggjast út sum skjótast. Vit vita, at tað ber til. Tað er bara ein spurningur um vilja.

## KOMMUNAN SKAL GANGA Á ODDA VIÐ GRØNARI ORKU

Eitt eru kommunalir bygningar, ið skulu hava grønar orkukeldur. Eitt annað eru túsundtals bústaðirnir, ið skulu skifta til grønar orkukeldur. Kommunan sjálv er steðgað upp og her skal verulig ferð setast á.

## LESTRARÍBÚÐIR OG ELDRAÍBÚÐIR

Heimildin er har. Kommunan skal av álvara fara undir at fyrireika bygging av lestraríbúðum og eldraíbúðum. Tað kann kommunan gera sjálv ella saman við vinnufyritøkum og pensjónsgrunnum.

## VÆLFERÐARØKINI

Tey eldru og vælferðarøkið í Tórshavnar kommunu bløða fyri, at vit hava ein himmalrópandi tørv á útbúnum starvsfólki. Einki útbúgvingarstað er í megin økinum og tað eigur kommunan at fara undir at loysa, í stundini.

## BÝARSAVNIÐ SKAL HAVA VIRÐILIGAR KARMAR

Býarsavnið, ið Birgar Johannesen ognaði Tórshavnar kommunu, býr í afturlatnum bingjum. Vit eiga at flyta

# VEL FRAMSÓKN Í BÝRÁÐIÐ

FRAMSÓKN LIBERALI TJÓÐSKAPARFLOKKURIN

tað, úr skýma skoti á fremsta bonk beinanvegin. Andliga sporføri í Havn skal sýnast fram við stoltleika og virðing.

## BÝARPARK Í HOYDØLUM

Lendisætlanin fyri Hoydalar, sum Um hvørvisstovan og Tórshavnar kommuna gjørdu í felag, skal setast í verk. Talan er um eina býarpark frá gróðurstøðini Hoydølum oman í Boðanes. Rørsla til likamið og balsam fyri sálina.

## BYGDIRNAR Í KOMMUNUNI

Vit vilja veita trygd fyri, at øll í kommununi fáa eitt gott ansingartilboð, møguleika at seta føtur undir egið borð og bústaðar trygd í nærumhvøvinum, eisini tá ein verður gamal og óhjálpin. Viðlíkahald í bygdunum, skal raðfestast hægri.

## HAVNIN SKAL RØKJAST

Tekniska undirstøðukervið, vegir og kloakkir, skulu røkjast og dagførast. Tað má skil koma á kloakkirnar, eisini tær, ið renna á sjógv, har fólk svimja.

## ÍTRÓTTUR OG FRÍTÍÐ

Yvirskipað hava stóru ítróttargreinirnar góðar karmar og um stutta tíð, skulu vit verða vertir fyri oyggjaleikum. Kommunan er og eigur at vera hollur viðleikari til, at allir hentleikar eru tøkir til størsta ítróttatiltak í mong ár.

## TJÓÐPALLUR

Meðan vit bíða eftir komandi tjóð pallinum, húsast verandi tjóðpallur í kommunalum hølum, sum eru í sera ringum og ótíðarhóskandi standi. Verandi høli treingja til ábøtur og vit vilja virka fyri, at tjóðpallurin fær munandi betri arbeiðsumstøður, til at seta upp leikir.

## FØROYA STØRSTI TÆNASTUDEPIL

Kommunala umsitingin eigur at verða miðsavnað úti í Sjóvinnuhúsinum, tá fróðskaparsetrið flytir út. Hetta leysgevur tíggjutals bygningar í miðbýnum til bústaðir og handilsvinnu.

## PARKERINGIN

Ein verkætlan við parkeringstunli er í umbúna. Vit taka undir við, at allir møguleikar viðvíkjandi parkering verða kannaðir.

## EIN VINNUVINARLIG KOMMUNA

Tað er tørvur á grundøkjum til smærri vinnurekandi. Her kundi man skapað økir, har fleiri og smærri vinnurekandi kundu sloppið fram at, uttan at grundøkja kostnaðurin skal verða tann allarstørsta byrðan, tá víðkað verður um verksemi.